Bygdaráðsfundur

Hvalbiar Kommuna

Dagfesting: 24.09.2026 kl. 16.30

Á fundi: Janus Thomsen
Poul Laust Christiansen
Rakul Mørk
Thorstein Thomsen (fyri Otto West)
Jóhannes Liasson Rasmussen
Jónfinn L. Poulsen

Ikki møtt: Ronni Hammer

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

Formaðurin bað um loyvi at taka eitt mál við aftrat, játtað og kemur á skrá sum mál nr. 7.

1. **102-63-2026: Umsókn um byggiloyvi til útbygging á matr. nr. 48k, Hvalba.**
   Til viðgerðar umsókn um loyvi til lítla útbygging av verandi sethúsum á Skálavegi 33, Hvalba. Byggimálsviðgerin mælir til at ganga umsóknini á møti.
   Tekniska nevnd 22.09.2026:
   Nevndin mælir til, at loyvi verður givið til byggingina.
   Avgerð:
   Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá nevndini og byggimálsviðgeranum og geva byggiloyvi sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum.

2. **102-65-2026: SSL – leingjan av verandi avtalu um skúlabarnakoyring.**
   Skriv frá SSL viðvíkjandi ætlan um at leingja verandi avtalu um skúlabarnakoyring til 30. apríl 2028 og komandi útboði av Bygdaleiðum.
   Trivnaðarnevndin 24.09.2026:
   Santykt varð einmælt at leingja verandi avtalu til 30. apríl 2028.
   Fíggjarnevndin 24.09.2026:
   Samtykt varð einmælt at mæla til at leingja verandi avtalu við einum ári, til 30. apríl 2028. Somuleiðis varð samtykt at mæla til, at samstarvið um skúlabarnakoyring heldur fram aftaná 30. apríl 2028.
   Avgerð:
   Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

3. **102-64-2026: Dagstovnurin Brosið – starvslýsing v.m.**
   Søkt verður um stuðulstímar til dagstovnin.

Trivnaðarnevndin 24.09.2026:
Nevndin er samd um at játta 30-35 tímar um vikuna til ein námsfrøðiligan stuðul á dagstovninum og somuleiðis verður starvslýsingin hesum viðvíkjandi eisini gingin á møti.
Fíggjarnevndin 24.09.2026:
Samtykt varð einmælt at mæla til at játta 30-35 stuðulstímar um vikuna og harvið eisini starvslýsing í hesum sambandi.
Avgerð:
Einmælt samtykt.

4. 102-66-2026: Innkomin tilboð – uppsetan av vevkamera.

Innkomin tilboð uppá uppsetan av vevkamera.

Sp/f Suðurnet (Hvalba)	kr. 12.000,00 stovningargjald u/MVG
-	kr. 6.000,00 árligt gjald u/MVG
Føroyar Live (Hvalba og Sandvík)	kr. 16.800,00 árligt gjald u/MVG – uppsetan, rakstur og viðlíkahald av báðum vevmyndatólunum

Fíggjarnevndin 24.09.2026:
Nevndin mælir til, at bygdaráðið tekur støðu til málið. Um vevkamera verður sett upp, verður mælt til at taka av lægra tilboðnum og at hetta verður sett upp á Fiskieiðinum, tá steyrin er settur upp, tó treytað av, at samband frammanundan er á økinum.
Avgerð:
Atkvøtt varð um at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini. Bert ein atkvøða var fyri og er málið sostatt fallið.

5. 102-67-2026: Heildarætlan Hvalba - kostnaðarmeting.

Tilboð frá Henning Larsen NA uppá arkitektaráðgeving í sambandi við eina heildarætlan, sum inniber bygdamiðju, uppskot til nýggj íbúðarøki, útstykkingar, uppskot til fríøki v.m.
Kostnaður sambært mettari tímanýtslu kr. 324.850,00
Fíggjarnevndin 24.09.2026:
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av hesum tilboði.
Avgerð:
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá nevndini.

6. 102-68-2026: Fíggjarætlan 2027 – 1. viðgerð.

Rakstrarútreiðslurnar eru mettar til kr. 40.145.000,00, íroknað nettoútreiðslur til eldrasamstarvið BHS kr. 11.971.000,00 og afturgjald av skuld kr. 2.600.000,00.
Inntøkurnar eru mettar til kr. 41.833.000,00, harav inntøkan frá eftirlønargjøldum, DIS og FAS er kr. 12.333.000,00 sambært meting frá FMR.
Fíggjarnevndin 24.09.2026:
Nevndin er samd um at mæla til at lækka skattaprosentið við 0,5% til 18,95%. Mælt verður til, at barnafrádrátturin verður hækkaður til kr. 9.000,00.

Avgerð:

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

7. 102-42-2026: Geopark í Suðuroy:

Tilmæli frá Jarðfeingi, at arbeitt verður víðari við málinum um at stovna eina geopark í Suðuroy og at Geopark-fyrirreikingarbólkurin fær heimild til at gera eitt ítøkiligt uppskot til skipan av einum felags kommunalum felag.

Avgerð:

Treytað av, at allar kommunurnar í Suðuroynni taka undir við hesum, varð einmælt samtykt:

1. at taka undir við, at arbeitt verður víðari við málinum um at stovna eina geopark í Suðuroy
2. at geva fyrirreikingarbólkinum heimild til at gera uppskot til skipan, endamál, fígging og viðtøkur fyri eitt felags kommunalt felag, sum kann reka og umsita geoparkina
3. at uppskotið til viðtøkur og skipan verður lagt fyri einstøku kommunustýrini til viðgerðar og endaliga støðutakan, áðrenn avgerð verður tikin um at gerast partur av felagnum

8. Ikki alment mál.

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.10.

Janus Thomsen Poul Laust Christiansen Jóhannes Liasson Rasmussen

Rakul Mørk Jónfinn L. Poulsen Thorstein Thomsen